# Árni Olafsson: Konspiratiónsteori um undirgrundina heldur ikki

**Árni Olafsson heldur, at tað objektivt sæð er tvætl, at danska stjórnin lat føroyingum rættin at umsita ráevnini í undirgrundini tí Danmark annars er bundið av einum ES-direktivi, ið krevur, at øll oljufeløg í ES fáa somu rættindini til boringar í ES-londum.**

NICLAS JOHANNESEN



Árni Olafsson: Hóast føroyska undirgrundin framvegis hevði verið umsitin av donsku stjórnini, hevði oljudirektivið hjá ES ikki verið galdandi fyri Føroyar.

Hví læt Poul Schlüter føroyingum rættin at umsita ráevnini í føroysku undirgrundini 3. desember 1992?

Hesin spurningur hevur síðan ofta verður vendur.

Og tá onki ítøkiligt »meiningsfult« svar er komið, hava ymsar teoriir sæð dagsins ljós.

### Konspiratión

Fyri tey, ið hava havt ilt við at trúgva, at rein donsk vælvild lá aftan fyri føroysku yvirtøkuna, hevur søgan um eitt ES-direktiv verið áhugaverd.

Konspiratiónin sær nøkulunda soleiðis út:

Danska stjórnin letur føroyingum rættin at umsita undirgrundina orsakað av einum ES- direktivi, sum gevur øllum londum innan Europeiska Samveldið somu rættindindi at bora eftir olju.

Við øðrum orðum:

Her er øll protektionisma bannlýst, og skulu danir bora, má tað vera tí teir eru betur kappingarførir enn aðrar fyritøkur í ES-høpi.

Júst av hesi orsøk kundi tað metast at vera taktist snilt av Schlüter at lata føroyingum undirgrundina. Tí nú varð (møguliga) oljuævintýrið ikki longur umsitið av ES-landi. Og soleiðis kundi danski oljuídnaðurin lirka seg inn gjøgnum føroysku bakdyrnar, uttan at nakað ES-direktiv gav øðrum somu rættindi.

### Tvætl

Men sambært okkara fremsta tænastumann innan føroyska oljufyrisiting, Árna Olafsson, heldur henda teoriin ikki.

Hann sigur:

- Objektivt sæð er tað tvætl at siga, at danska stjórnin lat føroyingum undirgrundina orsakað av einum oljudirektivi hjá ES.

Árni Olafsson leggur aftrat, at orsøkin rætt og slætt er, at eitt ES-direktiv er ikki galdandi fyri tann partin av danska kongaríkinum, sum er uttan fyri ES.

Sostatt er tann lóggávan, sum er galdandi í Føroyum ikki undirgivin nøkrum ES-direktivi. Og tá er tað líka mikið um talan er um sermál ella felagsmál.

- So objektivt sæð, heldur teoriin ikki, sigur Árni Olafsson og leggur aftrat:

- Um Schlüter kanska hevur trúð tí, so hevur hann ikki havt góða ráðgeving. Og tann møguleikin ikki kann útihýsast.

Hann leggur aftrat:

- Vónandi fáa vit svarið, tá Poul Schlüter útgevur sínar endurminningar.

# Arabo svarar fakfeløgunum

**Stjórin á Strandfaraskip Landsins (SL) Thomas Arabo sigur, at arbeiðarafeløgini hava misskilt samráðingar millum SL og bussførarar.**

**- Talan er ikki um lønarsámráðingar, sigur hann.**

NICLAS JOHANNESEN

- Eg havi skrivað fakfeløgunum bræv, har eg greiði frá, at talan er ikki um lønarsamráðingar við bussførararnar.

Hetta sigur Thomas Arabo í sambandi við, at Ingeborg Winther og Carl Johansen vegna Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag hava skrivað landsstýrismanninum við samskiftismálum Sámal Peturi í Grund eitt bræv.

### Modell

Í brævinum siga tey seg hava frætt, at SL førir lønarsamráðingar við bussførarar, sum annars eru løntir eftir teirra sáttmálum.

Men brævið er sambært Thomas Arabo altso misskilt.

- Tað einasta, vit hava fundast við bussførararnar um er, hvussu vit kanska kunnu fáa eina aðra modell upp at standa.

Thomas Arabo sigur, at talan er um eina sokallaða »forpagtingsmodell«, har bussførararnir skulu standa fyri viðlíkahaldi av bussum hjá SL.

### Framtíðin

- Vit hava sostatt slettis ikki verið inni á lønarsamráðingum. Og tað ætla vit okkum heldur ikki, sigur Thomas Arabo.

Hann vísir eisini til at SL ikki áður hevur staðið fyri bussraksturi, og tí er tað av týdningi at fáa bussarnir at virka innan røttu karmarnar.

Og tað er hetta SL roynir, við eitt nú at finna nýggja hættir at skipa bussraksturin í Føroyum.



Thomas Arabo: SL førir ikki lønarsamráðingar við bussførarar

# Fíggjarmálaráðharrin: Blíð viðferð samanborið við undanfarin ár

**Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður við fíggjarmálum, heldur ikki at kritikkurin frá donsku ráðgevandi nevndini er serliga harður.**

NICLAS JOHANNESEN

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum Jóannes Eidesgaard hevur ikki mist svøvnin orsakað av kritikkinum frá »Det rådgivende udvalg vedrørende Færøerne«.

Tvørturimóti.

Jóannes Eidesgaard sigur, at sæð í ljósinum á undanfarnu frágreiðingum frá somu nevnd, fær fíggjarlógin sera blíða viðferð.

### Skattalættin

- Sum eg lesi frágreiðingina, so staðfestir nevndin, at tað gongur rætta vegin.

Jóannes Eidesgaard sigur, at einasti ítøkiligi kritikkur, nevndin kemur við, er sjálvur skattalættin, sum varð givin á nýggjárinum.

Sjálvur sigur landsstýrismaðurin, at hóast provenuið til landskassan lækkar orsakað av skattalættanum, so roknar hann við at fleiri pengar í umfari millum manna fara at geva landskassanum inntøkur aðrar vegir.

Hann vísir eisini á, at teir búskaparfrøðingar hava hildið seg til eru av somu áskoðan.

- Tú mást eisini minnast til, at ein slík nevnd, sum tann ráðgevandi, bert kalkulerar út frá nøkrum lyklatølum. Teirra innfalsvinkul er treytaleyst búskaparligur. Teir taka ikki støðu til aðrar samfelagsligar- og sosialar trupulleikar. Í so máta er talan um køld og kynisk tøl, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

### Javnvág

Bonnerup og hansara menn skriva annars í frágreiðingini, at »udvalget ser...med bekymring på både den slækkelse af den økonomiske politik, som finansloven for 1996 indebærer, og de seneste kvoteforhøjelser samt udsigten til en ændret fiskeriregulering.«

Víðari skrivar nevndin:

»Udvalget skal fortsat pege på nødvendigheden af, at der hurtigst muligt tilvejebringes balance og derefter overskud på landsstyrets budget, så gælden kan nedbringes. Finansloven for 1996 er et skridt i den forkerte retning, idet skattelettelserne ikki modsvares af tilsvarende besparelser på de offentlige drifts- og anlægsudgifter.«

Og teir leggja aftrat:

»Finansloven for 1996 er således udtryk for en væsentlig lempelse af finanspolitikken på Færøerne, som vil vanskeliggøre landsstyrets målsætning om at skabe ligevægt på budgettet senest í 1998.«

Men hóast henda lyfta peikifingurin frá Bonnerup, so heldur Eidesgaard, at kritikkurin er ikki meira enn roknast kann við. Og hann er altso heldur ikki so dapurskygdur, tá tað snýr seg um umvegis inntøkur til landskassan orsakað av skattalættanum.



Jóannes Eidesgaard: Fíggjarlógin fær blíða viðferð í mun til undanfarin ár



Ráðgevandi nevndin við Erik Bonnerup: »Finansloven for 1996 er et skridt i den forkerte retning«





